†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Nilaina Elisabeth Hansen**
vanliga nevnd Laina,
ættað úr Rituvík, búsitandi á Toftum.

andaðist á Landssjúkrahúsinum
15. desember, 80 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni
leygardagin 20. desember kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Osla, Jákup og Lis**

## Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu tá kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Johanne Sofie Poulsen**
(Vanliga nevnd Lilly)

andaðist og varð jarðað.

Tøkk tit í heimarøktini. Tøkk øll, sum hjálptu til við jarðarferðina. Tøkk fyri blómur og kransar, og tit, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Gleðilig jól og gott nýggjár ynskist tykkum øllum.

**Símun Jóhannes, Jacobina og Esbern**

# Kamartónleikur í Havnar Kirkju

**Konsertfelagið og Havna Kirkja bjóða til matiné í Havn Kirkju leygardagin við klassiskum kamartónleiki**



JÓLAMATINÉ

Leygardagin verður jólamatiné í Havnar Kirkju. Tað er Konsertfelagið, ið skipar fyri.

Felagið sigur, at hóast nógvar konsertir eru, nú tað stundar til jóla, so bilar við klassiskum kamartónleiki, ið passar til kirkjukonsert, og hetta vil Konsertfelagið gera nakað við.

Tí tað er júst konsert við kamartónleiki, sum felagið skipar fyri, saman við Havnar Kirkju, leygardagin kl 11:30. Talan er um eina jólamatiné við fyrrapartstónleiki. Tórshavnar Manskór fer eisini at syngja.

Tey, sum spæla og syngja eru: Monica Stauss Joensen, violin og Ólavur Jakobsen, gittar Berghild Poulsen, sang og Árni Hansen, klaver, Oddvør Johansen, orgul, Jón Festurstein, violin og Christian Andreassen, gittar, Tórshavnar Manskór, stjórnað av Bjarna Restorff

Skráin fevnir um tónleik og sang, sum passar til jólahalguna. Eisini verður meira verðsligur tónleikur at hoyra.

# Bønarmál títt - tungutalan

BÓKAÚTGÁVA

*Tíðindaskriv frá Forlagnum Rhema:*

Í hesum døgum er júst ein nýggj bók komin út á føroyska bókamarknaðin. Tað er Fríðtór Debes, ið hevur skrivað. Heiti á bókini er: Bønarmál títt - tungutalan. Hetta er 6. bókin, ið Fríðtór Debes letur úr hondum.

At bøn hevur alstóran týdning í lívi hins trúgvandi, er vónandi ongin í iva um. Tá vit hyggja í Bíbliuna, síggja vit; hvussu ómetaliga stóran týdning menn og kvinnur løgdu í bønina og hennara stóra virði í lívi teirra.

Hví so ein bók sum henda? Jú, tí eg trúgvi, at vit ongantíð verða liðug at viðgera evnið bøn og tess týdning í lívi hins trúgvandi. Tað evnið fyri bøn, ið vit tosa um í hesari bókini - er um tungutaluna og hennara stóra týdning sum hjálp og amboð hins kristna. Heilt frá ápostlanna døgum og til okkara dagar hava menniskju biðið í tungum og brúkt teirra Himmalska mál. Ja, sjálvt í myrkastu miðøld - undir hørðum forfylgingum - var hetta mál virkið. Og í dag, 2000 ár eftir hvítusunnudag, eru tað framhaldandi nógvar milliónir, ið gera nýtslu av heum bønarmáli.

Bókin viðger 10 orsøkir, hví vit sum trúgvandi eiga at biðja í tungum og brúka hesa gávu í okkara persónliga bønarlívi - júst á sama hátt sum t. d. Paulus gjørdi. Bókin, Bønarmál títt - tungutalan, er 73 síður til støddar og kostar 80 kr. Hon fæst í flest øllum bókabúðum um alt landið. Tað er Hestprent, ið hevur staðið fyri prentingini.




# Trý kór í Havnar Kirkju

Jólakonsert verður í Havnar kirkju sunnudagin 21. des. 2003 kl. 16. Tey trý kórini, ið luttaka á konsertini í Havnar Kirkju sunnudagin eru:

### Kristiliga Sangkórið

Kristiliga Sangkórið heldur í ár 50 ára jubileum. Í hesum sambandi hevur kórið verið uttanlands í summar og vitjað í Danmark, Svøríki og Noregi. M.a. hevði kórið konsertir í 3 dómkirkjum, í Roskilde, Lund og Oslo. Í vetur hevur kórið ma. havt framførslur í Vesturkirkjuni, Norðurlandahúsinum, í Hesti og í Kirkjubø. Síðani byrjan hevur kórið sungið jólaløg í Havnar kirkju fyri jól og soleiðis verður eisini í ár. Hanus Joensen stjórnar Kristiliga Sangkórinum.

### Kórið Sólarmagn av Velbastað

Kórið hevur luttikið við ymisk høvi, sum hava verið í sóknini seinastu árini. Sólarmagn er mannað við fólki úr Kirkjubø og av Velbastað og fólki, sum annars hava tilknýti har.

### Tórshavnar Kamarkór

Tórshavnar Kamarkór er eitt av teimum væl kendu kórunum í landinum. Í løtuni er tað Fróði Sandoy, sum stjórnar báðum kórunum, Sólarmagn og Kamarkórinum.

Á skrá teirra er bæði føroyskt og útlendskt tilfar: m.a. Jósef og Maria eftir Paula í Sandagerði, Wie liegt die Stadt so wüst úr klaguljóðum Jeremiasar eftir Rudolf Mauersberger. Sólarmagn og Kamarkórið syngja saman enska jólasangin The First Nowell eftir D. Willcocks, limir úr Havnar Hornorkestri hava undirspælið.

Og at enda syngur stóra felagskórið, við øllum trimum kórunum, 2 kend jólaløg.

# Jólacafé í Runavík

JÓLAHUGNI

Komandi vikuskifti letur jólacaféin upp í Hæddini. Caféin letur upp kl. 16.00 bæði leygardagin og sunnudagin 20. og 21. desember. Tað er Eldrafelagið Nón, sum bjóðar øllum inn á gólvið til ein heitan kaffimunn við eplaskivum og mandlurís afturvið.

Leygardagin kl. 17.00 spæla Joan Simonsen og Bodil Tausen violin á caféini.

Sunnudagin kl. 17.00 spæla Maria Tausen v.fl. á fløjtu.

Í gongini í Hæddini er listaframsýning við umleið 10 málningum hjá Jørgin Olsen úr Runavík.

Handlarnir í Handilsmiðdeplinum hava opið til kl. 20.00 fram til jólar.

Tollaksmessudag er opið til kl. 22.00.



# Gev blindum eina bók í jólagávu




*Margreta Næs sigur, at enn er tað dýrt at gera ljóðbøkur, men nú hava tey fingið so mikið av stuðuli frá Landsbókasavninum og Almannastovuni, at gongd er í framleiðsluni allatíðina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Margreta Næs á Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð sigur, at tað er onki í vegin fyri, at lesi og sjónveik eisini kunnu fáa eina bók í jólagávu**

BØKUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ljóðbøkur gerast alt meiri vanligar. Hesar bøkur mugu sigast at hava ein avbera stóran týdning fyri tey, sum á ein ella annan hátt hava ilt við at lesa.

Margreta sigur, at tá ein hevur lurtað eftir eini bók, sum er innlisin á band ella fløgu, so kann ein av røttum siga, at ein hevur lisið bókina.

– Hesar bøkurnar verða nógv nýttar í skúlunum kring landið. Ikki allastaðni, tí øll eru ikki komin í gongd av álvara, men tað verður meira og meira av tí, sigur hon.

Ljóðbøkurnar kunnu somuleiðis verða við til at lætta um eina útbúgving seinni í lívinum, tí tá ein hevur valið millum at lesa sjálvur ella at lurta, so er tað eyðsæð, at møguleikarnir eru betri.

Í onkrum av okkara grannalondum er tað lógarbundið, at grundbøkur skulu vera til taks sum ljóðbøkur eisini.

Tað góða við ljóðbókum er, at ein kann gera so mang annað, meðan ein lesur. Koyra, rudda, vaska ella hvat tað skal vera.

Men tað týdningar-mikl-asta er sjálvandi, at tey, ið á ein ella annan hátt, hava tungt við at lesa, kunnu við eini ljóðbók lesa eins væl og onnur. Munurin er bara hann, at tey lurta, meðan tey lesa.

### Dýrar bøkur

Ein ljóðbók er sera dýr at gera. Margreta sigur, at ein miðal bók kostar um 20.000 krónur at gera og fáa út á øll bókasøvnini.

– Men um vit so tosa um Bíbliuna ella aðrar stórar bøkur, so sigur tað seg sjálvt, at tað verður mundandi dýrari, greiðir hon frá. Nýggja Testamentið finst tó sum ljóðbók.

Málið hjá teimum er, at tey skulu kunna gera 25 ljóðbøkur um árið, og gongdin er tann rætta vegin.

– Tað, sum hevur nakað at siga er, at øll sum eru lesiveik ella hava trupult við at lesa, skulu kunna lesa. Ein blindur skal kunna lesa eina bók, fyri tað um hann er blindur, og við ljóðbókunum ber væl til at geva einum blindum eina bók í jólagávu, sigur Margreta Næs. Hon leggur at enda afturat, at allir handlar liggja ikki inni við ljóðbókum, men tað er lætt at fáa hendur á teimum.

– Tað ber til at biðja handlarnar bíleggja ta bókina, sum ein vil keypa. Tað er ongin trupulleiki, sigur Margreta.

